gult cyan magenta svart



# Túsundárahald í Grønlandi

*Skipað verður fyri mentanarráðstevnu í Grønlandi í samband við at túsund ár eru liðin, síðan Leivur Hepni fann Amerika, og móðir hansara tók við kristnari trúgv*



Edvard Joensen

Útnorðurráðið skipar í døgunum 13. og 14. juli fyri mentanarráðstevnu í Qaqortoq (Julianehåb) í Grønlandi. Stevnan verður hildin í samband við, at tvey túsundárahald falla saman í Grønlandi.

Liðin eru túsund ár, síðan Leivur »Hepni« Eiriksson kom til londini vestan hav, sum í dag eita Amerika. Samstundis eru liðin túsund ár, síðan kristan trúgvin kom til Grønlands. Tað var móðir Leivs, Tjóðhildur, sum bygdi kirkju á garði teirra, Eiriks Reyða, í Brøttulíð.

Hesi bæði hátíðarhaldini eru løgd saman, og eftir mentanarráðstevnuna í Qaqortoq verður farið í Brøttulíð, har hátíðarhald verður dagarnar 15. og 16 juli.

Tað er Útnorðurráðið, sum skipar fyri mentanarráðstevnuni í Qaqortoq. Føroyingar hava í løtuni formannin í Útnorðurráðnum. Jógvan Durhjuus úr Tjóðveldisflokkinum er formaður.

Ein føroysk sendinevnd fer at luttaka í grønlendsku hátíðarhaldunum. Talan verður sjálvandi um formannin í Útnorðurráðnum. Men eisini útnorðurtingmenninir úr Føroyum, embætisfólk, løgmaður og varaløgmaður fara at luttaka.

Fylgið fór úr Føroyum við Atlantsflog til Grønlands um Ísland seinnapartin í gjár. Ferðalagið verður eftir ætlan aftur í Føroyum mikudagin 19. juli.

## Mentan

Evnið á mentanarráðstevnuni í Qaqortoq er ikki heilt óvæntað mentan. Stutt og greitt. Tó verður hugtakið mentan í hesum førinum býtt í tríggjar partar. »Mentanararvurin í Útnorði«, »Útnorður sum partur av norðurlendska mentanarsamstarvinum« og »Mentanarsamstarvið í Útnorði nú og í framtíðini.«

Ráðstevnan verður skipað við uppleggum frá fólki, sum arbeiða við mentan í økinum. Og sjálvandi verður eisini lagt upp til orðaskifti millum luttakararnar.

Millum luttakararnar á ráðstevnuni verða mentamálaráðharrarnir í útnorði umframt tann danska mentamálaráðharran. Elsebeth Gerner Nielsen luttekur sum formaður hjá norðurlensku mentamálaráðharrunum í Norrøna Ráðharraráðnum. Úr Føroyum luttekur Høgni Hoydal, sum umsitir mentamál í løtuni.

## Endurreisn

Annar partur av túsundára hátíðarhaldinum í Grønlandi verður í Brøttulíð, har Eirikur Reyði bygdi fyri góðum túsund árum síðani.

Útnórðurráðið hevur virkað fyri at endurreisa garðin og kirkjuna, sum kona Eiriks, Tjóðhildur, reisti. Kirkjan varð nevnd eftir henni. Tjóðhildarkirkja. Tó eru tað ikki teir upprunaligu bygningarnir, sum reistir verða aftur, uttan eftirgerðir skamt frá gamla búplássinum.

Hesir bygningarnir verða vígdir undir hátíðarhaldinum. Eisini verða teir alment latnir grønlendska heimastýrinum og Narsaq Kommunu í varðveitslu.

Hugskotið at endurreisa bygningarnar í Brøttulíð varð lagt fram á ársfundinum hjá Útorðurráðnum í 1992. Arbeitt varð við málinum, og í 1997 varð ein byginevnd sett at fyrireika sjálva endurreisnina. Formaður í bygginevndini hevur verið íslendski altingsmaðurin Árni Johnsen.

Jógvan Durhuus, formaður í Útnorðurráðnum, sigur, at nú bygningarnir standa lidnir, standa teir í umleið sjey milliónum krónum. Íslendingar og grønlendingar hava fíggjað meginpartin av kostnaðinum. Men føroyingar hava eisini verið við, sigur Jógvan Durhuus. Løgtingið hevur játtað 100.000,- krónur yvir tvey ár, meðan Landsstýrið gjøgnum Undirvísingar- og Mentamálastýrið hevur latið 50.000,- krónur til endurreisnina. Eisini hava nógvir aðrir sponsorar verið við í tiltakinum.

Væntað verður, at hendan endurreisnin av gamla garðinum fer at geva grønlendsku ferðavinnuni eitt gott íkast, eins og vónað verður, at tað kann fara at styrkja tað framman undan góða samstarvið, sum er í ferðavinnuni í Útnorði, sigur Útnorðurráðið í tíðindaskrivi, sum sent er út í samband við tiltøkini í Grønlandi komandi dagarnar.

Annars sigur Jógvan Durhuus, formaður í Útnorðurráðnum, at næsti ársfundurin hjá Ráðnum verður í Havn í døgunum 4. til 8. september. Tá verður nýggjur formanskapur valdur, og grønlendingar fáa tá formannin. Formansskapurin í Útnorðurráðnum situr eitt ár í senn og gongur upp á skift millum londini.

Δ

# Útferð í Sandoynni

*Fríggjakvøldið skipar Kunningarstovan í Sandoynni fyri túri út undir Borg í Skálavík*

Nú fer at bera til hjá ferðafólki at síggja drunnhvíta eystantil á Sandoynni.

Sandoyar Kunningarstova skipar fyri túrinum, sum verður út undir Borg í Norðasta Haga í Skálavík.

Útferðin verður gjørd í samband við fólkatónleikarakonsert, sum hildin verður í Skálavík fríggjakvøldið. Konsertin verður klokkan 20.oo.

Drunnhvítatúrurin verður um midnáttina, tá fuglurin plagar at leita sær heimaftur eftir veiðiferð til havs.

Í tíðindaskrivi sigur Sandoyar Kunningarstova, at okkurt verður at fáa til matna í húsinum undir Borgini um náttina.

Kostnaður fyri alt tiltakið, tað vil siga konsert og útferð, er kr. 150,-. Tilmelding er á Sandoyar Kunningarstovu, sum hevur telefon nr. 361836 ella fartlf. 222078

**ej**

# Aftur á Jólaskipið

*Ætlanin er aftur í dag at royna at kava niður til jólaskipið. Hetta verður helst seinasta leggið, nú verður gjørt*

Edvard Joensen

Í dag verður aftur roynt at sleppa niður til Jólaskipið í Fugloyarfirði. Nú vita kavararnir, hvar skipið liggur, og er tað tí nógv lættari at arbeiða.

Heri Andreasen, sum stendur fyri kavingunum, sigur, at á kyrrindunum klokkan hálvgum tólv fyrrapartin, verður farið niður aftur til vrakið. Ætlanin er hesaferð at taka tveir maskintelegrafar, sum kavararnir hava funnið, upp. Teir ætla at hevja teir við ballónum, sigur Heri Andreasen.

Umframt fer ein kavari at hava eina kurv við sær, sum hann skal fylla ymisk smáting í, sum teir hava sæð niðri við vrakið. Eisini er ein kassi, sum teir ikki vita, hvat í er, ið teir eru sera áhugaðir í at fáa við sær.

Teir skulu arbeiða skjótt. Luftmongdin er avmarkað, og skipið liggur so mikið djúpt, at tað tekur langa tíð at koma uppaftur. Tískil hava teir bara 18 minuttir av effektivari arbeiðstíð niðri við vrakið, sigur Heri Andreasen.

Hann sigur, at teir hava bara dagarnar í dag og í morgin at arbeiða í. Streymurin fer nú at taka til aftur, og donsku kavararnir noyðast avstað við Norrønu fríggjamorgunin.



Annars sigur Heri Andreasen, at tað upprunaliga málið við at finna skipið er rokkið. Ætlanin var frá byrjan av at finna Jólaskipið og filma tað. Tí málinum hava teir nátt. Men tað er altíð spennandi at taka ymiskt upp, tá nú møguleikin er har kortini, sigur Heri.

Hann veit ikki at siga, um tað nú er liðugt við kavingum eftir Jólaskipinum. Sum er hevur hann tó ongan, sum er sinnaður at fíggja fleiri royndir, skilst.

gult cyan magenta svart



# Atlantis – trý ár seinni

*Umbygda mentanarhúsið Atlantis í Klaksvík hevur ikki virkað sum veruligt mentanarhús í meira enn eitt ár, men nú er ein loysn fyri framman*



*Mentanarhúsið Atlantis í Klaksvík hevur ikki virkað sum mentanarhús í meira enn eitt ár, fíggjarligu viðurkskiftini rundan um húsini eru fløkt, men nú er kanska ein loysn fyri framman*

Eyðun Klakstein

Í august mánaði fyri trimum árum síðani læt umbygda mentanarhúsið Atlantis í Klaksvík upp. Fimm mánaðir og næstan tríggjar milliónir eftir at farið varð í holt við at umbyggja húsið, stóð tað klárt at taka í nýtslu.

Og eingin hevði nakað at finnast at. Húsið var sera snotiligt, tá tað læt upp, tað skuldi verða ein miðdepil fyri mentan í Norðoyggjum, og í húsinum var eisini nýggjur biografur, sum skuldi gera kvøldini hjá klaksvíkingum styttri.

Men eftir eina hugaliga byrjan kom mótburðurin. Ráðini vóru ikki til at hava ein dagligan leiðara, biografvirksemið leið undir einum tungum rakstri, og so við og við fækkaðust tilboðini í húsunum.

Seinasta árið hava onkur tiltøk verið í Atlantis, men tað hevur fyrst og fremst verið Klaksvíkar Sjónleikarfelag, sum hevur brúkt húsið. Tað breiða útboðið av mentanartiltøkum endaði við góðum sjónleiki, men so lítið meira.

## Sum sjálvsognarstovnur

Nú ætlar Klaksvíkar býráð, sum eigur húsini, at rættiligt lív aftur skal koma í Atlantis, og at fíggjarliga fløkjan rundan um húsini skal greiðast. Seinasta hósdag samtykti býráðið, at ein sjálvsognarstovnur skal yvirtaka Atlantis og fáa tað at rigga sum ein mentanardepil í Norðoyggjum - soleiðis sum upprunaliga ætlanin var.

Í nevndini fyri sjálvsognarstovnin skulu umboð fyri býráðið, Klaksvíkar Sjónleikarfelag og Norðoya Sparikassa sita. Hesir tríggir nevndarlimirnir skulu so fáa greiði á fíggjarligu trupulleikunum og miðja fram ímóti at seta ein dagligan leiðara, sum skal standa fyri virkseminum í húsinum.

Tað var breið undirtøka fyri avgerðini í Klaksvíkar býráði, og formaðurin í mentanarnevndini hjá Klaksvíkar býráði, segði í gjár við Sosialin, at hann helt hetta vera røttu loysnina á Atlantis-málinum.

## Tvífaldur kostnaður

Men søgan um umbyggingina av Atlantis er eisini søgan um eina umbygging, sum gjørdist tvífalt so dýr, sum upprunaliga ætlanina var. Og tað er eisini ein søga um fløkt fíggjarlig viðurskifti.

Upprunaliga ætlanin var, at umvælingin av Atlantis, sum byrjaði í mars mánaði í 1997, skuldi kosta 1,4 milliónir krónur, men hendan ætlanin kom ikki at halda. Tá umbyggingin var liðug, kostaði hon tað tvífalda - 2,8 milliónir krónur.

Orsøkin til hetta var millum annað, at talan var um gamlan bygning, sum varð settur í stand, at kjallarin varð innrættaður, og at økið uttan um húsini varð fríðkað.

## Ynsktu at arbeiðið varð víðkað

Klaksvíkar Sjónleikarfelag søkti í mars mánaði í 1997 landsstýrið um stuðul og fekk játta 30% av upprunaliga umvælingarkostnaðinum, tó í mesta lagi 396.000 krónur.

Næstan eitt ár eftir, at Atlantis var latið upp, søkti Klaksvíkar Sjónleikarfelag av nýggjum um stuðul frá landinum. Síðsta dagin í juli mánaði 1998 varð ein umsókn send til Undirvísingar- og Mentamálastýrið, har Klaksvíkar Sjónleikarfelag søkti um stuðul til tað, sum varð rópt tann „víðkaða verkætlanin Atlantis“.

Í umsóknini vísti Klaksvíkar Sjónleikarfelag á, at borgarar og lands- og kommunalpolitikarar ynsktu, at umvælingararbeiðið varð víðkað, tí Norðoyggjum vantaði í ólukkumát eitt mentanarhús. Hetta hevði nevndin tikið til eftirtektar og víðkaði verkætlanina.

Vi hesi grundgeving søkti Klaksvíkar Sjónleikarfelag um 30% í stuðli av teimum 1,470.000 krónunum, sum víðkaða verkætlanin kostaði afturat teimum upprunaligu 1,4 milliónunum, sum landið longu hevði játtað stuðul til.

## Fingu nei frá landinum

Síðani gekk næstan eitt ár, meðan umsóknin hjá Klaksvíkar Sjónleikarfelag var til viðgerðar ymsastaðni í umsitingini. Landsarkitekturin skuldi ummæla umsóknina, Fíggjarmálastýrið var eisini blanda uppí, og teir ymsu partarnir ryktu eftir svari frá hvørjum øðrum.

Hálvan juni mánaða í 1999 fekk Klaksvíkar Sjónleikarfelag so umsíðir svar frá Undirvísingar- og Mentamálastýrinum, sum boðaði frá, at tað ber ikki til at lata stuðul til tað sokallaðu víðkaðu verkætlanina, tí tað varð mett, at talan var um meirkostnað og viðlíkahald av upprunaligu verkætlanini.

Undirvísingar- og Mentamálastýrið vísti á, at tað bara stuðlar bygging, útbygging og umbygging og ikki meirkostnað av verkætlanum, og at umsøkjarar fáa at vita, at kostnaðarmetingin má halda.

Tað er eingin sum ivast í, at mentanarhúsið Atlantis er vert tær 2,8 milliónirnar, sum tað er umbygt fyri, men Undirvísingar- og Mentamálastýrið vil bara ikki lata stuðul til tað, sum tey meta verða meirkostnað av upprunaligu ætlanini.

## Nevndarlimir veðhalda

Landsstýrið og Klaksvíkar kommuna hava samanlagt stuðlað umbyggingini av Atlantis við umleið 850.000 krónum, og av restini av kostnaðinum er meginparturin fíggjaður við lántøku í Norðoya Sparikassa.

Og í sambandi við hesa lántøku gjørdust viðurskiftini í Atlantis enn meira fløkt. Klaksvíkar kommuna eigur bygningin, men tað er Klaksvíkar Sjónleikarfelag, sum rekur virksemið í honum.

Kommunan kundi ikki lata Klaksvíkar Sjónleikarfelag seta bygningin í veð fyri lántøku, og tí gingu nevndarlimirnir í Klaksvíkar Sjónleikarfelag við til at veðhalda fyri lántøkuni til Atlantis vegna Sjónleikarfelagið.

Skuldin í Atlantis er nú umleið 1,9 milliónir krónur við rentum, og av hesari skuld veðhalda fimm privatfólk fyri, hóast tað er mentanarhúsið Atlantis, sum hevur fingið ágóðan av pengunum.

Skuldin tyngir raksturin av Atlantis, og millum annað hesi fløktu fíggjarligu viðurskiftini gera, at húsið fæst ikki at virka, soleiðis sum ætlanin var. Annar trupulleiki er, hvussu og hvør skal reka húsið.

Norðoya Sparikassi vil hava sínar pengar aftur, Klaksvíkar kommuna vil ikki uttan víðari fara uppí og gjalda fyri Klaksvíkar Sjónleikarfelag, og tað tykist fullkomiliga órímiligt, at nevndarlimir í Klaksvíkar Sjónleikarfelag persónliga skulu gjalda fyri mentanarhúsið í býnum, hóast tey hava kautionera fyri láninum.

## Loysn fyri framman

Tað er millum annað hesar fløkjur, sum nýggi sjálvsognarstovnurin fyri Atlantis nú skal loysa.

Privatfólkini skulu sleppa undan sínum veðhaldi, Atlantis má sleppa av við stóran part av skuldini, Klaksvíkar kommuna má helst lata pengar til virksemi í húsinum, og Norðoya Sparikassi má helst vísa lagaligheit og kanska veitra farvæl til ein part av pengunum, sum stovnurin eigur til góðar fyri umbyggingina.

At Klaksvíkar kommuna og Norðoya Sparikassi eru við í nevndini fyri sjálvsognarstovnin gevur kanska eina ábending um, at partarnir vilja hava eina loysn á málinum, so mentanarhúsið Atlantis aftur kann fara at virka sum eitt veruligt mentanarhús.

Og ikki bert sum sjónleikur, so ella so…